# Prix Føroyar raðfylgjan avgjørd

**Leygardagin hevði FUT aðalfund og eftir aðalfundin fall avgerðin um, í hvørjari raðfylgju bólkarnir skulu spæla til Prix Føroyar finaluna tann 21. apríl. Útlendskir dómarar koma at døma finaluna og okkurt kent andlit er millum dómararnar**

PRIX FØROYAR
*Dagfinn Olsen*

Føroya Undirhaldstónleikarafelag hevði aðalfund um leygardagin og eftir fundin skipaði samskiparin Fróði Vestergaard fyri, so tónleikarar tóku seðlar, so greiða fekst á raðfylgjuni til Prix Føroyar finaluna.

Hetta var sjálvsagt spennandi løta fyri tónleikabólkarnar, ið hava spælt seg í finaluna.

Ikki allir bólkarnir vóru til staðar, men umboðsmenn vóru fyri allar bólkarnar. Ein fyrr og annar eftir fóru spentir tónleikarar upp at taka ein afturlatnan brævbjálva. Úrslitið gjørdist, at fyrstir á pallin í Norðurlandahúsinum tann 21. apríl verða Týr. Síðani I am, Tám, Tangz, All That Rain, Clickhaze, Flux og síðani 200.

Týr fara ætlandi á pallin klokkan 20:o5 og 200 enda ætlandi klokkan 23:10.

### Kend andlit

Eins og fyrr, so verða eisini útlendingar millum dómararnar til finaluna í át. Okkurt kent andlit er millum teirra. M.a. kemur kendi danski útvarps- og sjónvarpsverturin Hans Otto Bisgaard til Føroya at lurta og døma.

Umframt Hans Otto Bisgaard frá Metronome, koma Uffe Christensen, ummælari frá Jyllands Posten, Erik Jensen ummælari frá Politiken, Stefan Fryland plátuútgevari, ið er gamal í garði, Lennerth Backmann, Svøríki: Plátuútgevari, Jeppe og Jacob fra Fajabefa og Roskilde Upcoming, Torben Kruse ummælari frá Musikeren.

3 fyrireikarar koma frá Nibe-Festivalen og 3 fyrireikarar frá Jelling Festivalen.

Eisini kemur Jens Ove Friis, stjórið í plátufelagnum Art-Music og CMC. Egil Ólafsson íslendgur: Sjónleikari og tónleikari. Hann skal eisini hava skeið og m.a. kunnu tónleikarar frá honum fáa góð ráð í samband við framførslu.

Umframt hesar persónar, verða eisini føroyskir dómarar til Prix Føroyar finaluna tann 21. apríl.



*Aðalfundurin hjá FUT leygardagin. Eftir fundin varð Prix-finalan á skránni*
*Mynd: Dagfinn Olsen*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul av landnyrðingi, men út á dagin minkandi niður í lot til andøvsgul av ymsum ættum. Skýggjað og okkurt ælið. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av norði, seinni lækkar hann niður í eystan. Nakað av sól, tó okkurt vátakava- ella heglingsælið. Hitin um frostmarkið ella eitt vet omanfyri.




**Veðrið hósdagin:**
Hann vekstur vindin til hvassan vind av landsynningi. Sum fráliður skýggjað og turt um dagin, men um náttina fer at regna. Hitin økist til umleið 5 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi. Seinni vaksandi upp í hvassan vind av vestri. Skýggjað við regni í skiftum og møguliga mjørki. Hitin økist til millum 7 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst vestan fyri Skotland fer eystureftir og køld luft rekur aftan á tí.




Eitt grunt lágtrýst fer undan Íslandi til Norskahavið og fríggjanáttina fer eitt brúgvalag fram við Føroyum vestaneftir.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷11 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | 1 |
| Ammassalik | ÷7 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 2 |
| Seyðisfjørður | 1 |
| Tórshavn | 5 |
| Lerwick | 7 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 11 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 6 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 6 |
| Moskva | 14 |
| Berlin | 12 |
| Warzawa | 18 |
| Kiev | 17 |
| Bukarest | 15 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 15 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 16 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 7 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 35 |
| Jakarta | 25 |
| Sydney | 22 |
| New York | 5 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | – |
| Panama | 34 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 24 |

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 08/04 kl. 06[00]–09/04 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 3,0°
Minsti hiti máldur í apríl: ÷9,9° Mesti hiti máldur í apríl: 15,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,1 mm – mált frá 08/04 kl. 06[00]–09/04 kl. 06[00]
Avfallið higartil í apríl: 42,8 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

5. apríl: Mánin næstur jørðini
8. apríl: Fullmáni
15. apríl: Seinna kvarter
17. apríl: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2001

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 10. apr | 09.13 | 21.37 | 08.13 | 20.37 | 08.28 | 20.52 | 11.13 | 23.37 | — | 12.13 | 07.28 | 19.52 | 06.28 | 18.52 | 09.28 | 21.52 | 10.28 | 22.52 | 08.58 | 21.22 | 10.13 | 22.37 |
| 11. apr | 10.02 | 22.26 | 09.02 | 21.26 | 09.17 | 21.41 | — | 12.02 | 00.37 | 13.02 | 08.17 | 20.41 | 07.17 | 19.41 | 10.17 | 22.41 | 11.17 | 23.41 | 09.47 | 22.11 | 11.02 | 23.26 |
| 12. apr | 10.51 | 23.16 | 09.51 | 22.16 | 10.06 | 22.31 | 00.26 | 12.51 | 01.26 | 13.51 | 09.06 | 21.31 | 08.06 | 20.31 | 11.06 | 23.31 | — | 12.06 | 10.36 | 23.01 | 11.51 | — |
| 13. apr | 11.42 | — | 10.42 | 23.07 | 10.57 | 23.22 | 01.16 | 13.42 | 02.16 | 14.42 | 09.57 | 22.22 | 08.57 | 21.22 | 11.57 | — | 00.31 | 12.57 | 11.27 | 23.52 | 00.16 | 12.42 |

Sig tað uttan rokning



petur & petur • 320870

Føroya Tele kann nú bjóða tær eina heilt nýggja tænastu til tína GSM fartelefon, ið kallast Føroya Teletíð.

*Kom inn í eina av Telebúðunum og hoyr meira um, hvussu tú sleppur undan telefonrokningunum...*

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo

Uppsetan av antennum og parabolum

Ring og hoyr nærri ella støkk inn á gólvið



Søla og tænasta
Verkstaður
Antennu- og parabolmontering
Útleigan
radioep@olivant.fo

RADIOHANDILIN
N. Finsensgøta 16 · FO- 100 Tórshavn
Tlf. 318277 · Fax 318377

fk

Sera bíligt at LEIGA SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Lýðarsvegur 15 • Havn
Tlf. 319544